• Dánjal Johannes Fritjof Bolstad. 17 ár
• Johannes Poulsen, 31 ár

**Tvøroyri**
• Hans Pauli Thomassen, 29 ár. Eftir sat einkja og tvey børn.
• Anton Martin Fr. Henriksen, 30 ár. Eftir sat einkja og tvey børn.
• Johannes Joensen á Sondunum, 39 ár
• Tummas Marius Thomassen, 21 ár
• Georg Vilhlem Thorsteinsson, 32 ár, *Trongisvágur*. Eftir sat einkja og tvey børn

**Úr Froðba**
• Jaspur Juel Vang, 25 ár
• Tummas Pauli Stenberg, 21 ár

**Skúvoy**
• Johan M Michelsen, 21 ár
• Jens Sigvard Ingvald Mikkelsen, 27 ár. Eftir sat einkja og trý børn

**Skarvanes**
• Óli Johan Joensen, 32 ár. Eftir sat einkja

## Karen hvørvur eisini

Longu tann 20. september noyðist Føroyatíðindi aftur at koma við eini ófrættargrein, har tað verður sagt:

Aaret 1920 har været et sandt Ulykkesaar for de færøske Skibsfiskere. I Foraaret blev Kutterne Helene af Trangisvaag og Kristine af Klaksvig borte med Mand og Mus, og den samme skæbne har nu utvivlsomt mødt en tredje Kutter, nemlig Karen af Trangisvaag.

Men medens de to førstnævnte bukkede under for Storm og Søgang eller forliste ved Sammenstød, er Karen utvivlsomt forsvundet i Bølgerne under Omstændigheder, som man hidtil ikke har regnet med, naar Talen er faldet paa de Farer, der stedse truer vore Sømænd under udøvelsen af deres Dont i de urolige Farvande ved Island og Færøerne.

Kutteren er ganske sikkert minesprængt, hvad enten det nu skyldes Sammenstød med en Mine eller Forsøg paa at uskadeliggøre en af disse, Forsøg som flere Besætninger men en næsten utrolig Mangel paa omtanke har indladt sig paa og heldigvis som ved et Under er sluppet godt fra.

Omtrent ved den Tid, da Minerne først observeredes ved Langanes, befandt Karen sig i dette Farvand, efter hvad de hjemvendte Fiskere beretter, men allerede kort efter havde man mistanke om, at Kutteren var bleven borte, da den ikke blev set ved Næsset af en eneste af de Skibe, der til stadighed befandt sig her og derfra satte Kursen mod Hjemlandet.

Storm af en saadan Styrke, at den kunde gøre Skibe nævneværdig Skade, var ikke fremkommet, og derfor laa det nær, tilmed da der observeredes adskillige Vrag, at antage og befrygte, at Skibet var blevet minesprængt.

Denne Antagelse er nu bleven til Vished, uden at man dog har mindste oplysning om, hvornaar og hvorledes Ulykken har fundet Sted. Bortebleven med Mand og Mus, det er det eneste sikre man ved.

Tretten af vore raske og uforfærdede Fiskere er ved denne Lejlighed gaaet i Døden efterladende 9 Enker og 23 uforsørgede Børn. Sorgen kom i dette Tilfælde saa meget mere overraskende, som man mente, at her var Fred og ingen Fare, da det var Meningen, at Kutteren skulde vende tidligt tilbage fra Fiskeriet ved Island, førend Efteraarsstormene havde rejst sig i deres fulde Kraft.

Karen tilhørte Købmand Thomas Jacob Salmony og førtes af Fiskeskipper

Jacob Ludvig Jespersen, Tveraa, 32 Aar gl, der efterlader sig Enke og 2 Børn.

Hinir av manningini vóru:

**Av Tvøroyri**
• Tummas Juel Jespersen, 34, ár, beiggi skiparan. Eftir sat einkja og 4 børn
• Axal Ludvig Danielsen, í Ungagarði, 57 ár. Eftir sat einkja
• Jóhan Jákup Danielsen, 29 ár, sonur Axal. Eftir sat einkja og 1 barn.
• Petur Juul Danielsen í Ungagarði, 26 ár
• William Mohr Danielsen, 23 ár.
• Petur Hans Lindberg. Etir sat einkja og 1 barn
• Niels Hovgaard, 36 ár úr Trongisvági. Eftir sat einkja og fimm børn.

**Úr Hovi**
• Niels Tausen, 36 ár. Eftir sat einkja og tvey børn.
• Ólaus Hovgaard, 46 ár. Eftir sat einkja og 8 børn.
• Dánjal Jákup Hovgaard, 63 ár.
• Óla Jákup Hammer, 49 ár. Eftir sat einkja.
• Jens Hammer, 20 ár.

Eftir sótu 9 einkjur og 23 børn.

## Tríggjar einkjur í sama húsi

Som oftest er det tilfælde, naar Skib eller Baad forliser paa Færøerne, at nærbeslægtede



*Mangan hevur verið váttligt hjá fiskimonnum*



*Fiskaturkipláss hjá J. Mortensen við skipum*

Personer omkommer. Saaledes ogsaa her. Jacob Ludvig Jespersen og Thomas Juel Jespersen var brødre, og Peter Juel Danielsen og William Mohr Danielsen ligledes. Ole Jacob Hammer omkom tilligemed sin søn Jens Hammer, og Axel Ludvig Danielsen tilligemed sin Søn Johan Jacob Danielsen og sin Svigersøn Jacob Ludvig Jespersen, der var Skibets Fører. De tre sidstnævnte beboede samme Hus, der nu rummer tre Enker, hvis Sorg over Tabet af deres Forsørgere er hjerteskærende.

Om Enkerne gælder det, at de alle sammen er fattige, saa at Samfundets Hjælp her om nogensinde skulde synes at være paa Plads.

Den korte Strækning af Tveraa, der benævnes Tveraabakke, imellem Hvidenæs og Indsejlingsfyret, hvor der findes 18 Beboelseshuse, er blevet haard ramt ved Aarets 3 Forlis.

Med Helene omkom 2 Mand, med Kristine 1 og nu med Karen 7 Mand, i alt 10. Man bruger et mildt udtryk, naar man siger, at Sorgen, der har ramt dette lille Kvarter af Pladsen, er helt overvældende.

## Um Karen TG 437

Samb. Páll Nolsøe var Karen bygd í 1880 í Grimsby. Hon var dammslupp og merkt 69 tons. Í 1899 varð hon seld til Esbjerg og fekk navnið Karen. Haðani keypti Tummas Jákup Salmony keypmaður í Trongisvági í 1908 hana.

Skipari í 1908 var Andrias Hammer á Toftum. Í 1911-1913 førdi Petur Jákup við Gjógv hana.

Skipari á Karini eysturlandstúrin 1915 var Thedor Poulsen av Toftum, sum í 1924 sum skipari gekk burtur við Onnu.

Skipari á Karini í 1920 var Jákup Jespersen í Ungagarði á Tvøroyri. Hann var føddur 25. august 1888 og tók skiparaprógv hjá Jens í Dali í 1914. Hann hevði árini frammanundan verið til skips við bróðurinum Mortan í Ungagarði og var bestimaður hjá honum í 1912, tá ið hann sló út av Teistanum.

Jákup hevði ikki gingið uppá skúla tá, men hann sigldi Teistan inn í Oyggjarnar, og fyri tann góða sjómannsskap, hann her hevði sýnt, fekk hann 100 kr sum eina heiðursløn frá Suderø Fiskeriforsikring.

## Hjælp de fattige færøske Fiskerenker og deres faderløse Børn

Hetta var yvirskriftin á grein í Føroyatíðindi tann 4. oktober 1920. Her verður víst á, at við hesum trimum forlissum eru 48 fiskimenn farnir. Eftir sita 20 einkjur við 51 børnum.

Næstan allar hesar einkjur eru sera fátækar og hava størstu trupulleikar at skaffa sær og børnunum føði og klæðir. Víst fáa tær eitt sindur av trygging og einkjubarnastuðul. Men bert við hesum koma tær skjótt at standa á berum.

Fleiri av forsyrgjarunum hava í krígsárinum bygt sær uppá seg dýr hús. Teir hava tikið lán, sum tað vil vera ómøguligt hjá einkjunum at gjalda aftur. Eftir mongum av teimum ungu fiskimonnunum sita gomul foreldur, sum skuldu havt synirnar sum stuðul í ellisárum.

Tað ber illa til at vísa størri samkenslu við hesum einkjum enn við at stuðla teimum at uppala børnini til at gerast nyttigir partar av samfelagnum.

Tí roknar blaðið við at fáa stuðul til eitt uppskot um eina peningainnsavnan, har úrslitið skal býtast til hvønn einstakan í mun til tørvin. Tað ber ikki til at tryggja teimum allar tíðir. Men tað skuldi kunnað borið til at givið einkjunum so mikið av stuðul, at tær kunnu fáa útbúna til okkurt handaverk, so tær harvið kunnu forvinna nóg mikið til undirhaldið hjá teimum og børnunum.

Tað kann ikki vera ivi um, at føroyskir reiðarar og fiskimenn, fólk í øðrum størvum eins og handlar, fyritøkur og feløg fara at stuðla hesi søk meira ella minni. Eingin gávu so lítil, at hon verður forsmáað, og "mange bække små…"

Heitt verður á hini bløðini um at fáa hesa áheitan út millum fólk, eins og tey verða biðin um at taka ímóti gávum.

Ikki verður heldur gloymt gávumildni frá dønum til tey, sum sótu eftir vanlukkudagin upp undir jól í 1913, tá ið nógvir bátar serliga í Norðoyum gingu burtur.

Eisini hesaferð verður heitt á danir og danskar stovnar um at geva eitt íkast til hetta endamálið.

Síðan verður skotið upp at seta eina nevnd við umboðum fyri fiskimannafelagið og reiðarafelagið og einum føroyskum embætismanni, sum skal býta innkomna stuðulin út til tey ymisku heimini eftir tørvi.

**Komandi partur**
Í komandi parti verður millum annað greitt frá lagnum í Hovi, sum vóru raktar av vanlukkuni við Karen

Sosialurin